**Vegleiðing – seta ein F-connector á ein sjónvarpskaðal**

Hetta er ein F-connector



Tá tú skalt seta ein F-connector á ein kaðal, skalt tú fyrst gera kaðalin kláran. Sjónvarpskaðalin hevur ein kopartráð í miðjuni, og hann er pakkaður í plastikk. Uttaná plastikkinum er plastfilmur og eitt net av fínum træðrum, og at enda er hetta pakkað inn í uttasta lagið.

Niðanfyri er ein myndarøð, sum vísur, hvussu tú gert.

1. Fyrsta stigið er at máta 2x 8 mm á kaðalin:




Síðani skalt tú skera inn til kopartráðin innast í káplinum.

GG! Tað er SERA umráðandi, at teir tunnu træðrirnir uttast á kaðalinum ikki nema við kopartráðin, tí hetta førir til eitt skammlop.



2. Annað stigið er at taka uttasta lagið av kaðalinum. Her mást tú vera sera varin við ikki at skera ov djúpt, so at tú rakar teir tunnu træðrirnar. Teir skulu brúkast fyri at tryggja, at sjónvarpssambandið er so gott sum gjørligt.



3. Eftir hetta skalt tú leggja tað tunna netið av tráðum aftureftir og tryggja tær, at allir eru tiknir við.



4. Síðsta stigið er at skrúva F-connector á kaðalin sum víst niðan fyri og so klippa kopartráðin sum víst.



